## DBU bíðar við avgerðini

Danska fótbóltssambandið skal finna nýggjan heimavøll til danska landsliðið eftir gøluna í Parkini, tá ið ein áskoðari gjørdi seg inn á dómaran. Danmark sleppur framvegis at spæla dystirnar innanfyri síni egnu mørk, men tað er ikki greitt, hvar næstu dystirnir verða spældir. Fremst í røðini til at hýsa landsliðnum standa Århus, Aalborg og Herning, men avgerðin um nýggja heimavøllin bíðar til juli mánað, tá ið endalig avgerð er tikin um revsingina frá UEFA.



## Kanoute aftur til Ongland

Fredi Kanoute er álopsspælari, sum er ættaður úr Mali. Hann hevur millum annað spælt fyri ensku feløgini West Ham og Tottenham, men hevur nú roynt seg í Sevilla, har tað hevur gingist honum sera væl. Nú eru ensk feløg aftur áhugað í honum, og millum tey, sum sigast vilja keypa hann, er Newcastle. Í Newcastle fyrireika tey seg til, at Michael Owen fer at skifta til annað felag, og Kanoute kundi verið eitt uppskot sum avloysari.

# B68 flytur upp í september

**Toftamenn skulu missa fimtan stig í mun til ÍF, um plássið í bestu deildini skal gleppa teimum av hondum**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Lítil og eingin ivi tykist vera um, at B68 næsta kappingarár verður partur av bestu deildini. Spurningurin er heldur, nær B68 fer at hava tryggjað sær uppflytingina. Í løtuni eru toftamenn 15 stig frammanfyri triðja plássið. Um teir fara at megna at varðveita henda munin, so verður tað mitt í september, at uppflytingin verður tryggjað. Tað kann væl fara at vísa seg, at tað verður fyrri enn so.

Botnliðið í B36 vitjaði á Svangaskarði, og gestirnir megnaðu at halda tørn í ein tíma. So setti Rúni Nolsøe seg sjálvan, Alex Troleis og unglingaspælarin André Olsen á vøllin, og tað hjálpti.

Rúni Nolsøe skoraði til 1-0 eftir innlegg úr vinstru frá André Olsen, Dánial Hansen skoraði til 2-0 og 3-0 eftir innlegg úr høgru frá Kristiani Anton Andreasen, og veteranurin Arnbjørn Danielsen staðfesti 4-0 sigurin við rimmar fluktara eftir innlegg úr høgru.

ÍF og FSV04 kappast um næstfremsta plássið. Uppgerðin teirra millum í Fuglafirði endaði 2-2. Gunnar Haraldsen legði FSV04 framum eftir fríspark úr høgru og eitt sindur av aftur og fram, og í næsta ÍF álopinum javnaði Høgni Zachariassen, tá ið hann við handara stólpa stýrdi frísparksinnleggi úr høgru í málið.

Bartal Eliasen varð skiftur inn í 70. minutti, og fimm minuttir seinni skoraði hann úr sera spískum í høgru og flatt í handara síðunetið. Leingi tóktist hetta skula verða sigursmálið, men tá ið stóripinnur var farin næstan fimm ferðir runt aftaná 90 minuttir javnaði Andrzej Stretowicz við fínum fluktara úr 18 metrum og umvegis tvørtræið.

Í Sørvági endaði tað 1-1, tá ið TB vitjaði. Jens Erik Rasmussen umsetti brotsspark í síðstu løtu í 1. hálvleiki til heimamál. Dómarin peikaði á ellivu metrarnar, eftir at Jørgen Meitilberg varð hildin.

Seytjan minuttir undan leikloki javnaði Einar Petersen við brotssparki. Eisini í hesum førinum varð dømt fyri at halda í brotsteiginum.

Í Leirvík hekk málleysur javnleikur í summarluftini, eftir at báðir málverjarnir høvdu havt góðar bjargingar. Men í 87. minutti var toppskjúttin hjá LÍF upp á spæl. Adrian Joensen skoraði sigursmálið við fínum skoti.

Longu fríggjakvøldið var stevnudystur í Runavík, har KÍ vitjaði. Fótbóltsundirhaldið var fínt, og heimaliðið vann 4-3. Viggo Johannesen legði NSÍ framum eftir horna, og Erik Nielsen javnaði við góðum skoti. Bergur Djurhuus legði NSÍ framum aftur eftir snarálop, og í síðstu løtu undan steðginum javnaði Julian Samuelsen við framúr góðum sparki úr 23 metrum. Bólturin streyk upp í málhornið.

Stórt korter fyri leiklok stútaði Sonni L. Petersen til 3-2 eftir innlegg úr vinstru. Eyðstein Skipanes økti til 4-2 við fríspark, sum kostaði Asbirni Tungá reytt kort orsaka av neyðbremsu. Í síðstu løtu minkaði unglingaspælarin Páll Klettskarð um munin við brotssparki.

### FAKTA UM 1. DEILD

**B68-B36 4-0 (0-0)**
1-0: Rúni Nolsøe
2-0: Dánial Hansen
3-0: Dánial Hansen
4-0: Arnbjørn Danielsen
Reytt kort: B36

**ÍF-FSV04 2-2 (1-1)**
0-1: Gunnar Haraldsen 30.
1-1: Høgni Zachariassen 31.
2-1: Bartal Eliasen 75.
2-2: Andrzej Stretowicz 90.

**LÍF-HB 1-0 (0-0)**
1-0: Adrian Joensen 87.

**NSÍ-KÍ 4-3 (2-2)**
1-0: Viggo Johannesen 16.
1-1: Erik Nielsen 22.
2-1: Bergur Djurhuus 42.
2-2: Julian Samuelsen 45.
3-2: Sonni L. Petersen 73.
4-2: Eyðstein Skipanes 79.
4-3: Páll Klettskarð br 90.
Reytt kort: Asbjørn Tungá, KÍ, 78.

**SÍ-TB 1-1 (1-0)**
1-0: Jens Erik Rasmussen br 45.
1-1: Einar Petersen 73.

# Torkil vann einkultstartin

**Leygardagin skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri súkklukapping í einkultstarti fyri vaksin, unglingar og børn**

SÚKKLING

*tíðindaskriv*

Súkkla var á vegnum millum Hvalvík og Saksun.

Vaksnu súkklararnir súkklaðu úr Hvalvík til Saksunar og aftur til Hvalvíkar tvær ferðir. Unglingarnir skuldu súkkla helvtina av teininum sum vaksnu súkklararnir súkklaðu, men har møttu eingir luttakarar til kappingina.

Børnini súkklaðu nakað styttri. Ein ruta uppá 2 km var máld upp, og á hesum teini fyrigekk øll súkklingin fyri bólkarnir 1,2 og 3.

Bólkur 3, sum eru 12-14 ár (árg. 93-95) súkklaðu 6 km. Har vóru tríggir luttakarar, einans dreingir. Hesir høvdu allir súkkla kapp fyrr. Harald Joensen vann, men vágadrongurin Jóanis Albert Nielsen sum súkklaði á fjallasúkklu, meðan hinir súkklaðu á kappsúkklu, megnaði at vinna sær eitt annað pláss. Benjamin Thomasen sum var triðji maður hevði eitt sindur av tekniskum trupuleikum, men var væl við í kappingini hóast alt.

Í bólki 2 sum eru 9-11 ár (árg. 96-98) var býtið millum kynini betur. Hesi skuldu súkkla 4 km. Her vóru eisini tvær gentur við. Tær vóru sera javnar, og tað vísti seg at bert 4 sekund skilti tær, og tað var Tórun Hentze Laksafoss sum fór við sigrinum, meðan Jórunn Maria Dalsgaard bleiv nummar tvey.

Hjá dreingjunum var størri munur. Niels Gilstein Midjord vann við einum heilum minutti á kappingarneytanum Rasmus Mohr Nielsen, men tað skal sigast at Niels súkklaði á kappsúkklu, meðan Rasmus og nummar trý Magnus Heinason Eysturoy súkklaðu á kappsúkklu.

Yngsti bólkur skuldi súkkla 2 km. Hesi eru yngri enn 8 ár (fødd í og aftaná ’99).

Tummas Simonsen dróg longsta stráið har, meðan Bartal Dam Gregoriusen bleiv nummar tvey. Argjamaðurin Hákun Poulsen gjørdist nummar 3.

Hjá vaksnu súkklarunum vóru 5 luttakarar. Longdin á teininum var 36 km. Kappingin byrjaði kl 10 leygarmorgun, og kanska ávirkaði tað luttakaratalið at tað var so tíðliga um morgunin, men hvussu var og ikki so gjørdist 17 ára gamli Torkil Veyhe vinnarin. Meðal ferðin hjá honum lá um 41 km/t í meðal. Hetta er høg ferð á einum einkultstarti, og tað munnu ikki vera nógvir av føroysku súkklarunum sum hava súkkla so skjótt á einum so longum teini.

**Bólkur 1 dreingir – 2 km**

| Nr | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Tummas Simonsen | 5,35 |
| 2 | Bartal Dam Gregoriusen | 6,05 |
| 3 | Hákun Poulsen | 6,43 |

**Bólkur 2 dreingir – 4 km**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Niels Gilstein Midjord | 14,16 |
| 2 | Rasmus Mohr Nielsen | 15,30 |
| 3 | Magnus Heinason Eysturoy | 15,32 |

**Bólkur 2 gentir – 4 km**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jórunn Maria Dalsgaard | 20,21 |
| 2 | Tórunn Hentze Laksafoss | 20,23 |

**Bólkur 3 dreingir – 6 km**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Harald Joensen | 24,20 |
| 2 | Benjamin Thomasen | 28,04 |
| 3 | Jóanis Albert Nielsen | 28,08 |

**Vaksin – 36 km**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Torkil Veyhe | 1.18,22 |
| 2 | Gunnar Dahl-Olsen | 1.21,45 |
| 3 | Eli J. Christiansen | 1.24,54 |
| 4 | Sigmund Olsson | 1.32,10 |
| 5 | Ottar í Hjøllum | 1.36,01 |